

## Tónleikur

# Bloodgroup (FO/IS) rokkaðu Roskilde

Hóast Roskilde Festivalurin offisielt ikki byrjar fyrr enn í dag, so hevur tónleikur ljómað fyri allar tjaldararnar úti á tjaldingarøkinum síðani sunnudagin.

Í gjárskvøldi vóru tað so íslendsk-føroysku Bloodgroup við Janusi Rasmussen (Lama Sea, DJ·ÓR) á odda, ið framførdu har á pallinum, sum kallast Pavilion Junior.

Teltið var næstan fult (serliga av føroyingum og íslendingum) til Bloodgroup, sum endaðu kvøldið í gjár. Tað var gott lív og lekkurt veður, og tey góvu sum sigst frá frískum føroyingum, ið eru á Roskilde hesar dagarnar, eina sprenlívliga framførslu, sum geilaði teltið fullkomiliga upp.

Høgni Egholm Magnussen var á staðnum í gjár og tók myndir av fólki og framførslu.



















